# Við kórsangi til Uppsala

**Navn:** Marjun Bæk
**Bústaður:** Kirkjuvegur 24, 340 Kvívík
**Aldur:** 57
**Starv:** prestur
**Frítíðarítriv:** ymiskt handarbeiði, syngja í kóri og lesa bøkur

*Nær fært tú summarfrí í ár?*
Eg fari í summarfrí seint í juli, og eg fari aftur til arbeiðis á leið 20. august.

*Hvussu fert tú at halda summarfrítíðina?*
Í húsum okkara í Havn saman við familjuni og møguligum summargestum. Harafturat skal eg til Uppsala í Svøríki við kórsangi, og møguliga verði eg eisini nakrar dagar í Keypmannahavn.

*Hví hevur tú valt at gera júst hetta?*
Mær dámar best at vera í Føroyum um summarið - hvørt ár í optimistiskari vón um, at vit fara at fáa eitt sindur av summari!

*Plagar tú at ferðast uttanlands um summarið?*
Nei. Men eg lovi hvørja einastu ferð, summarið hjá okkum hevur verið vánaligt, at næsta ár fari eg...

*Plagar tú at ferðast í Føroyum um summarið?*
Alt ov lítið. Tað er oftast tá vit hava onkrar gestir at ferðast við, sum vit kunnu vísa runt.

*Ferðast tú hinar árstíðirnar?*
Mest í lestrarørindi ella til skeið í Danmark. Men eg havi leingi ætlað at flyta meg onkustaðni til sól og hita t.d. í november mánaði. Kanska verður tað í ár?

*Hvat er títt dreymaferðamál?*
Eg vil fegin síggja eina pyramidu, áðrenn eg fari hiðani.



*Marjun Bæk, prestur, ferðast ikki so nógv í øðrum londum, men hon sigur seg fegna vilja síggja eina pyramidu, áðrenn hon fer hiðani*




















